# r – men tann ungi vann



ðurin av

Mynd: Jens Kr. Vang



*Eyðun Nolsøe endaði Prix Føroyar finaluna við helst besta og mest fangandi sanginum í finaluni yvirhøvur*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

ikki bara dugir at seta ferð á, men eisini kann steðga eitt sindur á og spæla við stórum kenslum og inniligum tónum.

Seinasti sangurin var aftur ein meira lívligur sangur, har Uni sang meira enn í teimum báðum undanfarnu løgunum. Tónleikurin var í miðdeplinum, gittarin slapp fyrst og fremst at snakka, og tað gjørdi GoGo Blues til ein heilt serligan bólk hetta kvøldið.

### Betri endi enn byrjan

Eyðun Nolsøe var seinastur av teimum trimum finalistunum, og hann var tann mest popputi av teimum.

Framførslan hjá Eyðun endaði betur, enn hon byrjaði. Fyrsti sangurin var mest sum ov hampuligur og fittur at seta hol á við, men bólkurin vísti tó, at teir hava tríggjar sera góðar sangarar. Kim Hansen legði eitt sindur óvæntað fyri sum sangari, Jens Marni Hansen tók yvir, áðrenn Eyðun Nolsøe sum tann triði kom á vøllin – tað er neyvan nakar annar poppbólkur sum kann manna so sterkt vokallið sum Eyðun Nolsøe og Showmenn.

Eyðun Nolsøe spældi tríggjar sangir, sum hann áður hevur spælt í Prixnum, og eftir tann fyrsta sangin kom eitt sindur meira lív í, og bólkurin fekk luft undir veingirnar.

Seinasti sangurin byrjaði við einum útvarpsbroti, har nakrar av viðmerkingum, sum hava verið um serliga Eyðun Nolsøe og Terja Rasmussen, rungaðu aftur við bleiktrandi ljósum. »Í kvøld doyði føroyskur tónleikur«, »eg vildi spýggja« og so víðari ljóðaði tað, áðrenn sangurin »So nógvar røddir« drønaði avstað. Hetta mundi vera besti og mest fangandi sangurin í Prix-finaluni, og framførslan hjá Eyðuni endaði so væl, sum hon kundi gera.

### Uni á toppinum

Vinnarin av Prix Føroyum gjørdist GoGo Blues, og tað var væl uppiborið. Uni Debess og hansara menn spældu sera væl, og bluestónleikurin hjá teimum er – so løgið tað ljóðar – ein hugalig nýskapan í føroyskum tónleiki.

Blues – aldargamli tónleikur, sum føroyingar ongantíð av álvara hava tikið til sín – situr nú á Prix-trúnuni anno 2005, og tað hevur ein ungur tónleikari og fyrrverandi lastbilamekanikari størsta heiðurin av.

Uni Reinert Debess er ein eyðagóður og dugnaligur tónleikari, sum arbeiðir miðvíst og seriøst við sínum tónleiki, og hann er ein verdugur vinnari av Prix Føroyum 2005.

### Seinasta dømingin dumpaði

Dømingin í finaluni var øðrvísi enn í teimum fimm innleiðandi kappingunum. Dømt var eftir somu treytum, men ístaðinfyri 10 føroyskar dómarar vóru tað í finaluni 23 útlendskir dómarar og eingir føroyskir. Teir føroysku dómararnir høvdu fingið sekkin.

Men at lata tríggjar føroyskar bólkar spæla til eitt stórsligið føroyskt tiltak, sum bara er framleitt av føroyingum, og so lata útlendskarar dómarar hava alt at siga, virkar illa umhugsað. Vanliga hava útlendskir gestir dømt saman við føroyingum, og tað hevur hóskað seg væl, men bara at hava útlendskar dómarar er nærmast ein háðan av bólkunum í finaluni.

Hvussu nógv mundu dómararnir skilja av framførsluni hjá Terja Rasmussen og Eyðuni Nolsøe, har orð, føroyskir tekstir og speiskar viðmerkingar spældu ein týðandi leiklut?

Víst skulu vit hugsa um útlandið við okkara tónleiki, men at koyra allar teir føroysku dómararnar burtur úr og lata útlendskar gestir, sum nógvir eru komnir til Føroya at leita eftir onkrum heilt serligum, einsamallar finna vinnaran í Prix Føroyum, var ikki besta loysnin.

## Uni í sjeynda blues-himli

**Uni Debess fótaði sær, hóast ein strongur fór av stemningi undir framførsluni í Prix Føroyar finaluni. Hann heldur, at tað besta við at vinna var, at hann fekk eina viku í góðum studio**

VINNARI
*Eyðun Klakstein*
eydun@sosialurin.fo

Oddamaðurin í bólkinum GoGo Blues var ein sera glaður maður, eftir at Atlantic Music Event hevði verið. Hansara bólkur var kosin at vera tann besti í eini atkvøðugreiðslu um eina AME-virðisløn, og hann vann Prix Føroyar kappingina.

– Tað var fantastiskt. Tað besta við at vinna Prix Føroyar var, at vit fingu eina viku í einum góðum studio. Tað var akkurát tað, sum vit høvdu brúk fyri, tí vit hava nógv tilfar liggjandi, sum vit vilja hava spælt inn, sigur Uni R Debess.

– Eg helt, at tað var ómøguligt, at ein bólkur, sum spælir blues-tónleik, kundi vinna Prix Føroyar.

### Strongur gleið

Undir fyrsta sanginum leygarkvøldið fór ein strongur á gittaranum hjá Una av stemningi, og tað kom rættiliga upp á tvørs, men hann kláraði tó at fóta sær og fekk strongin upp á pláss aftur.

– Tá ið tú spælir improvisatións-tónleik, liggur tú allatíðina á eggini, men tú klárar altíð at lofta tær onkursvegna. Soleiðis skal tónleikur verða, heldur Uni Debess.

– Eg væntaði, at strongurin, sum gleið, fór at vera ein vansi í dømingini, og tí hevði eg als ikki væntað at vinna kappingina – hvørki áðrenn ella aftaná.

Men tað gjørdist ikki avgerandi, og Uni vann hóast alt.

Mánadagin tók Uni sær av løttum eftir eitt strævið vikuskiftið, men í dag stendur aftur tónleikur á skránni, tí hann og bólkurin skulu fyrireika seg til eina ferð til Grønlands í næstu viku.